# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*– Leingi livi kollveltingin, sum fer at halda fram*

*Hugo Chaez, forseti í Venesuela*

# Hann fekk seks ár afturat



*Hugo Chavez verður sitandi sum forseti*

**Tann umstríddi Hugo Chavez heldur fram sum forseti í Venesuela eftir stórsigur í gjár.**

- Leingi livi kollveltingin, rópti Hugo Chavez, tá valnevndin hevði boðað frá, at hann hevði vunnið forsetavalið. Uppteljingin var ikki liðug, men Chavez var so langt framman fyri mótvalevnið, Manuel Rosales, at sigurin var vísur.

Valnevndin kunngjørdi í morgun, at tá 78 prosent av atkvøðunum vóru taldar, hevði Chavez fingið 61 prosent og Rosales 38 prosent.

- Vit ásanna, at tey vunnu á okkum í dag, men stríðið heldur fram, segði Manuel Rosales. Hann er guvernørur í tí oljuríka landspartinum Zulia og stillaði upp fyri andstøðuflokkarnar.

Eygleiðarar siga, at tann greiði sigurin gevur Hugo Chavez heimild til at halda fram við tí, sum hann sjálvur kallar "tann bolivianska kollveltingin", og sum hevur gjørt, at hann er illa lýddur í yvirstættini í Venesuela og í Washington. Harafturímóti er hann sera væl lýddur millum tey fátæku í Venesuela, og tað var teimum fyri at takka, at hann vann í 1998 og 2000. Tey hava eisini valt hann hesaferð, og sigurin í gjár var størri enn hinir báðir. Venesuela er eitt av teimum stóru oljulondunum, og Chavez brúkar altsamt fleiri oljupengar til sosialar skipanir, heilsumál og útbúgving, sum serliga koma teimum fátæku til gagns.

## STUTT SAGT

### Hávur tók beinið

Leygardagin var tann 15 ára gamli Zak Golebiowski var farin ein túr við vatnbretti saman við einum vinmanni einar 700 kilometrar sunnan fyri býin Perth í Avstralia. Brádliga leyp ein hávur á Zak. Hávurin beit annað beinið av oman fyri knæ, og hitt beinið varð eisini illa bitið. Bjargingarmenn fingu Zak í land beinanvegin. Hann hevði mist nógv blóð og varð alt fyri eitt fluttur á sjúkrahús. Leiðin, har Zak varð álopin, er hávaleið, men myndugleikarnir vita ikki, hvat hávaslag tað var, sum leyp á drongin. Í meðal verða umleið 15 fólk álopin av hávi í Avstralia um árið, men tað er sjáldan, men álopini krevja sjáldan mannalív.

### Slapp leysur

Ein kanningardómari í Kroatia hevur gjørt av, at Branimir Glavas skal latast leysur úr varðhaldinum, sjálvt um illgruni er um, at hann framdi krígsbrotsverk undir borgarakrígnum á Balkan fyrst í nítiárunum. Branimir Glavas hevur verið í hungursverkfalli í ein mánað og er sera veikur, og tí hevur dómarin gjørt av at lata hann leysan. Tann 50 ára gamli Glavas hevur alla tíðina hildið uppá, at hann er ósekur, og hann fór í hungursverkfall fyri at mótmæla, at hann var tikin. Hann er annars undir illgruna fyri at hava beint fyri fleiri serbum í Kroatia undir borgarakrígnum.

### Srasi-filmur bestur

Týski filmurin "Lívið hjá hinum", sum er um virksemið hjá loyniligu løgregluni í gamla Eysturtýsklandi, Stasi, vann tvær virðislønir á evropeiska filmfestivalinum í Warszawa um vikuskiftið. Filmurin varð kostin tann besti evropeiski filmurin í ár, og Ulrich Muhle fekk virðisløn sum besti leikari.

## Spenningur í Libanon

Um vikuskiftið kringsettu fleiri túsund mótmælisfólk stjórnarskrivstovurnar í libanska høvuðsstaðnum Beirut, og tey sýta fyri at fara haðani, fyrr enn stjórnin leggur frá sær.

Vesturlendskir eygleiðarar í Beirut siga, at mótmælið hevur verið friðarligt, men at støðan er spent. Í gjár ljóðaði, at Hizbollah fer at royna at taka stjórnarskrivstovurnar, og tað fekk libanska herin at senda hermenn og stríðsvognar at verja bygningin. Herovastin hevur sagt, at herurin fer at svara øllum álopum á stjórnarskrivstovurnar. Mótmælisfólkini hava svarað, at tey fara ikki til hús, fyrr enn stjórnin leggur frá sær.

# 40 ára fongsul fyri neyðtøku

**Ein amerikanskur hermaður hevur fingið 40 ára fongsul fyri at hava neyðtikið eina kvinnu í Filipsoyggjunum**



*Daniel Smirh í miðjuni*

Daniel Smith fekk í morgun at vita, at hann skal sita í fongsli í Filipsoyggjunum tey næstu 40 árini.

Fyri einum mánað síðani neyðtók Daniel Smith eina filipinska kvinnu í einum bili inni á einari niðurlagdari amerikanskari herstøð. Kvinnan, sum ikki er nevnd við navni í sambandi við málið, var drukkin. Í rættinum viðgekk Daniel Smith, at hann hevði havt samlegu við kvinnuni, men hann helt uppá, at hon hevði ikki sett seg upp ímóti tí.

Men Benjamin Pozon, dómari, trúði ikki frágreiðing hansara og dømdi tann unga hermannin 40 ára fongsul.

Sambært ákæruritinum vóru tríggir aðrir amerikanskir hermenn vitni til neyðtøkuna, og teir skulu eisini hava eggjað honum til at neyðtaka kvinnuna. Kortini vórðu teir fríkendir.

Rættarmálið ímóti amerikonsku hermonnunum hevur fingið nógva umrøðu í fjølmiðlunum í Filipsoyggjunum og hevur elvt til stórar mótmælisgongur.